# LEIÐARAPROFILUR

## Leiðari til Sóljugarð

## September 2023

**INNIHALD**

INNGANGUR ..... 3

UM SÓLJUGARÐ ..... 3

STARVIÐ SUM LEIÐARI TIL SÓLJUGARÐ ..... 4

FØRLEIKAKRØV TIL LEIÐARAN ..... 5

LØN OG SETAN ..... 6

UMSÓKN OG UPPLÝSINGAR ..... 6

SETANARTILGONGDIN ..... 6

TÁ STARVIÐ ER SETT ..... 6

## INNGANGUR

Vága kommuna skal hava nýggjan leiðara til Sóljugarð, og talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, sum er leyst at søkja.

Í hesum sambandi hevur Vága kommuna gjørt eina styttri miðlalýsing um starvið, og eisini hendan leiðaraprofilin, sum er ein nærri lýsing um, hvat starvið inniber, og hvørjar væntanir Vága kommuna hevur um førleikar og royndir hjá umsøkjarum til starvið. Leiðaraprofilurin verður nýttur sum grundarlag undir viðgerðini av umsóknum, og endamálið við leiðaraprofilinum er, at væntanir hjá Vága kommunu og umsøkjarum hóska so væl saman sum til ber. Harumframt leggur Vága kommuna dent á, at umsøkjarar og kommunan hava felags fatan um starvið, soleiðis at setanin kemur at eydnast.

Fyri at geva umsøkjarum so gott grundarlag sum til ber, hevur kommunan eisini gjørt eina stutta lýsing um Sóljugarð.

## UM SÓLJUGARÐ

Sóljugarður liggur í Sandavági, og er staðsettur mitt í bygdini við sera vakrari náttúru rundanum. Í Sóljugarði eru tríggjar vøggustovur, tvær barnagarðsstovur og ein stova til tey seks ára gomlu. Sóljugarður er eitt spennandi arbeiðspláss, og tað starvast um 25 fólk í stovninum. Sóljugarður ynskir at leggja dent á, at skapa gott samband við barnið og foreldrini, og tí verður arbeiðið skipað soleiðis, at tað alsamt kann hóska so væl sum til ber til tørvin hjá einstaka barninum og familjuni hjá barninum, sí meira á heimasíðuni: www.soljugardur.fo.

Sóljugarður leggur seg eftir at gerast ein burðardyggur dagstovnur, ið virðismetir náttúrunnar ringrás. Sum liður í hesum eru 14 høsnarungar fluttir inn í stásiliga høsnarhúsið hjá stovninum. Hønurnar eta matrestirnar, og á henda hátt slepst undan matspill. Tað er samstundis gott fyri børnini at umgangast og hava umsorgan fyri djórum. Sóljuðarður hevur eisini ein kálgarð, soleiðis at børnini eisini læra hvar tað ymiska kemur frá.

Vága kommuna leggur stóran dent á, at hava eitt fjølbroytt og dygdargott dagstovnatilboð. Í hesum sambandi arbeiða leiðslurnar, dygdartoymi og námsfrøðiligi ráðgevin hjá Vága kommunu saman í einum barnagarðstoymi. Harumframt verður eisini abeitt við verkætlanini “Saman um barnið”, sum er ein verkætlan har kommunurnar í Vágum og stovnar hjá landinum arbeiða saman um, at tað skal gerast betri at vera barn í Vágum sum heild.

**STARVIÐ SUM LEIÐARI TIL SÓLJUGARÐ**

Leiðarin hevur evstu ábyrgdina av Sóljugarði og tí er ynskiligt, at leiðarin hevur leiðsluroyndir, góð evni at leiða starvsfólkini og megnar at fáa fylgiskap. Tað hevur stóran týdning, at leiðarin megnar at leiða námsfrøðiliga virksemi, og at fáa starvsfólkini at taka ábyrgd og samstarva so væl sum til ber. Tað er eisini umráðandi, at leiðarin brennir fyri økinum, og samstundis hevur hugsjónir og vil virka fyri einum høgum námsfrøðiligum støði børnunum at frama. Harumframt er avgerandi at leiðarin dugir væl við fólki, og at byggja upp gott samstarv við foreldrini. Eisini er neyðugt at leiðarin dugir fyrisitingarliga og fíggjarliga handverkið, og fremur skilagott samstarv við politisku skipanina, umsitingina og leiðslurnar innan barnagarðsøki í Vága kommunu, eins og aðrar viðkomandi áhugapartar.

**Týdningarmiklastu uppgávurnar hjá leiðaranum eru at:**

- skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfólkunum
- leiða starvsfólkini og áhaldandi skapa eitt gott og trygd arbeiðspláss
- tryggja fakliga menning, trivnað og gott samstarv í Sóljugarði
- tryggja, at Sóljugarður hevur fullgóða fíggjarstýring og sunnan rakstur
- tryggja at bygningar og aðrar ognir vera viðlíkahildnar so skynsamt sum til ber
- samstarva við politisku skipanina, umsitingina í Vága kommunu og leiðslurnar innan barnagarðsøki um at menna og framtíðartryggja tænastustøði hjá Vága kommunu
- hava virknan leiklut í verkætlanini "Saman um barnið"

**FØRLEIKAKRØV TIL LEIÐARAN**
Umsøkjarar til starvið verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum.

Fakligir førleikar
- Útbúgving sum námsfrøðingur
- Leiðsluútbúgving og/ella leiðsluroyndir frá líknandi starvi er ein fyrimunur
- Royndir frá arbeiði innan eina politiska skipan er ein fyrimunur
- Góð fíggjarlig og analytisk evni
- Kunnleiki til fyrisiting og fyrisitingarliga handverkið
- Royndir og kunnleika innan verkætlanararbeiði
- Góðan teldukunnleika
- Dugir væl at samskifta og málbera teg á føroyskum í skrift og talu

Leiðslu førleikar
Ynskiligt er, at leiðarin hevur flest allar av hesum eginleikum. Væntað verður at tú:
- ert ein týðiligur leiðari við góðum evnum at leiða starvsfólk
- ert ein sjónligur og fyrikomandi leiðari, sum dámar at møta børnum, foreldrum og starvsfólkum
- torir at taka neyðugar avgerðir, og fremur tiknar avgerðir í verki
- ert treyst/ur og letur teg ikki lættliga taka av fótum
- ert ein orkufullur leiðari við góðum ”drive”
- ert ein opin og savnandi leiðari fyri Sóljugarð
- dugir væl at lurta og at eggja til nýhugsan

Persónligir førleikar
Leiðarin fyri Sóljugarð hevur nógv samskifti og samtarv við onnur, og tí eru persónligu eginleikarnir týdningarmiklir. Væntað verður, at tú:
- ert tænastusinnað/ur, nærverandi og týðilig/ur
- dámar væl at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag
- kanst arbeiða sjálvsstøðugt, samstundis sum tú dugir væl at arbeiða saman við øðrum
- dámar væl at samstarva og samskifta við børnini, foreldrini og starvsfólkini
- dugir við fólki, ert jalig/ur, siðilig/ur og vísir øðrum álit og virðing
- ert sterk/ur og hevur ró og yvirlit, eisini tá støðan gerst torfør, ella tá arbeitt verður undir trýsti
- ert ein persónur, sum onnur kenna seg trygga/n við at tosa við, og hava virðing fyri

**LØN OG SETAN**
Miðað verður eftir at starvið kann verða sett frá 1. november 2023, ella eftir nærri avtalu. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**UMSÓKN OG UPPLÝSINGAR**
Umsóknir við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast við telduposti til: vaga@vaga.fo.

**Umsóknir skulu verða Vága kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. September 2023.**

Áhugaðir umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Jóhan Hendrik Ellefsen, kommunustjóra á telefon 794408, ella við telduposti: jhe@vaga.fo.

**SETANARTILGONGDIN**
Tá umsóknarfreistin er farin, verður ein setanarbólkur settur at meta um umsøkjarar, og at gera tilmæli um setanina. Setanartilgongdin verður skipað á tann hátt, at setanarbólkurin velur nakrar umsøkjarar til fyrstu samrøðu. Eftir fyrstu samrøðu verður mett um, hvørjir umsøkjarar skulu koma til aðru samrøðu. Teir umsøkjarar, ið koma til aðru samrøðu, skulu áðrenn samrøðuna taka eina test, har dentur verður lagdur á leiðslu. Úrslitini frá testini verða gjøgnumgingin saman við umsøkjaranum, áðrenn tey verða løgd fram fyri setanarbólkinum.

Tá setanarbólkurin er liðugur við sítt tilmæli, verður tilmæli viðgjørt av Fíggjarnevndini í Vága kommunu, sum tekur avgerð um setanina.

**TÁ STARVIÐ ER SETT**
Eftir at hava verið í starvi í fimm mánaðir verður fyrsta uppfylgjandi samrøðan, og eftir eitt ár í starvi verður onnur uppfylgjandi samrøðan, sum fyrst og fremst eru ætlaðar at gera støðuna upp í mun til væntanir hjá báðum pørtum.